## UTTAN ÚR HEIMI

## Slakaði fyri USA

Myndugleikarnir í Eysturtimor hava slakað fyri amerikanskum trýsti og hava bundið seg til ikki at útflýggja altjóða krígsbrotsmannadómstólinum amerikanskar ríkisborgarar til rættarsókn. Frammanundan hava Ísrael og Rumenia gjørt tað sama.

Amerikanska stjórnin hevur sýtt fyri at samstarva við krígsbrotsmannadómstólin, tí stjórnin ber ótta fyri, at amerikanskir ríkisborgarar kunnu verða drignir fyri rættin av politiskum orsøkum. USA legði stórt trýst á ST, sum endaði við, at trygdarráðið gjørdi av, at tað fyrsta árið skulu eingir amerikanarar dragast fyri rættin í Haag. Dómstólurin fór til arbeiðis tann 1. juli.

Seinastu dagarnar hevur USA lagt trýst á ES-londini fyri at fáa tey at gera tað sama sum Ísrael, Rumenia og Eysturtimor.

## Rabbinari finst at Ísrael

Yvirrabbinarin hjá jødunum í Bretlandi, Jonathan Sacks, sigur, at framferðin hjá ísraelsmonnum ímóti palestinum er ikki sambærilig við jødisku trúarlæruna.

Jonathan Sacks, sum hevur verið leiðari hjá teimum 280.000 bretsku jødunum síðani 1991, vísir m. a. á Mósebøkurnar, sum siga, at jødarnir skulu ikki kúga onnur fólkasløg ella fara illa við teimum. Sambært Sacks verður hetta sagt heilar 36 ferðir í Mósebókunum.

Yvirrabbinarin mælir samstundis ísraelsku stjórnini til at taka sínar hermenn aftur av teimum økjunum, sum hava verið hersett síðani kríggið í 1967. Sambært Jonathan Sacks átti Ísrael at havt tikið seg aftur fyri langari tíð síðani.

## Skipasmiðja letur uppaftur

Stóra skipasmiðjan Mjellem & Karlsen í Bergen, sum lat aftur herfyri eftir at vera komin í penganeyð, lat uppaftur í gjár eftir at hava fingið so mikið av pengum, at arbeiðið kundi takast uppaftur.

Skipasmiðjan hevur fingið arbeiðið at vídlíkahalda nøkur skip hjá norsku sjóverjuni, samstundis sum hon hevur vunnið útbjóðingina um at byggja tvey nýggj sjóverjuskip. Mjellem & Karsen hevur í fleiri ár leigað øðrum norskum skipasmiðjum serkøn arbeiðsfólk, og hetta virksemið verður eisini tikið uppaftur nú.

Leiðslan á Mjellem & Karlsen roknar við, at umleið hundrað menn fáa arbeiðið á skipasmiðjuni í fyrsta umfari.

## Gentur funnar myrdar

Seinastu mánaðarnar hevur amrikanska løgreglan leitað eftir tveimum gentum, 12 og 13 ára gamlar, og nú hava myndugleikarnir funnið líkini av teimum.

Tey bæði líkini vórðu funnin uttan fyri eini húsini hjá tí 39 ára gamla Ward Weaver, men sambært FBI er maðurin ikki skuldsettur fyri at hava beint fyri teimum. Tað er tó ein sannroynd, at tann 39 ára gamli maðurin kendi ta 12 ára gomlu Ashley Pord og ta 13 ára gomlu Mirandu Gaddis, tí tær báðar vóru vinkonur dóttur hansara.

Ein sonur Ward Weaver hevur sagt fyri løgregluni, at pápi hansara myrdi tær báðar genturnar.

# Sýtir USA at nýta herstøð til álop á Irak

**Tað lítla Qatar við Persaflógvan hevur boðað amerikansku stjórnini frá, at amerikanarar sleppa ikki at nýta flogstøðina har til eitt álop á Irak.**

USA-IRAK

*Árni Joensen:*



*Uttanríkisráðharrin í Qatar, al-Thani, avmyndaður í Bagdad í gjár, har hann boðaði frá, at USA sleppur ikki at nýta Qatar sum lopfjøl í einum álopi á Irak.*

USA hevur eina stóra flogstøð í Qatar við Persaflógvan, men nú siga myndugleikarnir har, at amerikanarar sleppa ikki at nýta flogstøðina til eitt møguligt álop á Irak.

Harvið tekur Qatar somu støðu sum Saudiarabia og Bahrein. Tey bæði londini boðaðu herfyri amerikanska uttanríkisráðnum frá, at USA sleppur ikki at nýta støðir har til tað ætlaða álopið á Irak og Saddam Hussein.

Amerikanskir fjølmiðlar hava seinastu dagarnar sagt, at USA umhugsaði at flyta ein part av teimum 6.000 hermonnunum, sum hava støð í Saudiarabia, til al-Odaydia-flogstøðina vestan fyri høvuðsstaðin í Qatar, Doha.

Men uttanríkisráðharrin í Qatar, al-Thani, segði eftir ein fund í Bagdad í gjár, at stjórn hansara fer ikki at lata amerikanarar nýta Qatar sum eina lopfjøl í einum álopi á Irak.

– Vit royna at bjarga okkara parti av heiminum undan fleiri vanlukkum. Vit eru sjálvandi ímóti øllum hernaðartiltøkum ímóti Irak, og okkara áskoðan hevur altíð verið, at ósemjur skulu loysast við diplomatiskum stigum ígjøgnum ST, segði al-Thani.

Eygleiðarar halda, at endamálið við Bagdad-ferðini hjá uttanríkisráðharranum var at fáa stýrið hjá Saddam Hussein at góðtaka, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST sleppa aftur til landið at kanna iraksku vápnagoymslurnar.

# Tvær milliónir svølta - stjórnin vil ikki hava hjálp

**Í afrikanska landinum Zambia er vandi fyri, at tvær milliónir fólk kunnu doyggja í hungri, men stjórnin sýtir fyri at taka ímóti mati frá vesturlendskum hjálparfelagsskapum.**

AFRIKA SVØLTAR

*Árni Joensen:*

ST sigur, at í minsta lagi 13 milliónir fólk í londunum har suðuri í Afrika eru í vanda fyri at doyggja í hungri teir næstu mánaðarnar, fáa tey ikki ta neyðugu hjálpina. Minst tvær milliónir teirra búgva í Zambia.

Fleiri altjóða hjálparfelagsskapir hava seinastu tíðina roynt at útvega teimum neyðstøddu matvøruhjálp, men í Zambia hava felagsskapirnir fingið eitt rættiliga óvæntaðan trupulleika.

Zambiski landbúnaðarmálaráðharrin, Mundia Sikatana, hevur boðað hjálparfelagsskapunum frá, at landið tekur ikki ímóti teimum genviðgjørdu matvørunum, sum felagsskapirnir hava boðið teimum svøltandi í Zambia. Sambært ráðharranum bera myndugleikarnir ótta fyri, at tær genviðgjørdu matvørurnar kunnu skaða landsins egna landbúnað, og harafturat kvíða teir fyri, at matvørurnar kunnu vera heilsuskaðiligar.

Við amerikanska sjónvarpið CNN sigur zambiski landbúnaðarráðharrin, at koma tær útlendsku genviðgjørdu matvørurnar í samband við landsins egna landbúnað, kann tað gera óbótaligan skaða, sum fer at taka livibreyðið frá nógvum fólki í Zambia. Ráðharrin sigur seg fegnast um, at umheimurin er sinnaður at hjálpa teimum neyðstøddu, men hann heldur uppá, at Zambia er ført fyri at loysa sínar egnu trupulleikar.

Avgerðin hjá zambisku myndugleikunum kemur ógvuliga óvart a á teir stóru hjálparfelagsskapirnar. Talsmaðurin hjá Alherims Matvøruhjálpini, James Morris, sigur, at hansara felagsskapur fær einki gjørt, halda zambisku myndugleikarnir fast um, at teir vilja ikki hava matvørur, sum eru framleiddar við hjálp av biotøkni.

Amerikanska uttanríkisráðið er eisini ørkymlað av zambisku støðutakanini og hevur biðið ES hjálpa sær at sannføra zambisku stjórnina um, at genviðgjørdar matvørur eru ikki heilsuskaðiligar. ES-nevndin hevur síðani boðað frá, at eingin vandi er við at eta hesar matvørurnar, men nevndin legði tó afturat, at vilja londini ikki hava hjálpina, er tað teirra avgerð og ábyrgd.



